

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 10 - 2012

# Oljuprísur hækkar nógv

Spenningurin millum Turkaland og Sýria hevur havt stóra ávirka á oljuprísin, sum í løtuni er 112,49 dollarar fyri tunnuna ella ein hækking uppá 4,51 dollarar og 4,18% síðani tíðliga hósdagin. Tað var eitt álop úr Sýria, sum hevði við sær, at Turkaland svaraði aftur við at bumba eina hernaðarstøð nær turkiska markið. Hetta hevur skapt stóran spenning í økinum og hevur ovasta leiðslan í NATO mótmælt sýriska álopum uppá tað harðasta. Eisini hevur turkiska tjóðartingið givið stjórnini grønt ljós at senda herfólk og útgerð til markið. Eftir tað hevur Sýrialand givið grannanum eina umbering fyri álopið, sum tað sigur ikki var tilætlað. Eygleiðarar vilja vera við, at Turkaland neyvan fer at gera innrás í Sýrialand, eftir at umberingin er komin. Støðan setir tó Turkaland í eina sterkari støðu í øllum økinum. Kelda E24.no